# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Føroya Landfúti:

## Átta starvsfólk heiðraði

Á innanhýsis samkomu hjá fútanum mánadagin 3. januar 2005 fingu átta starvsfólk handað »politiets hæderstegn«.

Heiðursteknið verður latið á nýggjárinum til teirra, sum hava havt 25 ára starvsdag í farna árinum.

Aftara rað f.v.: Eyðun Arge, politistøðin í Havn, John Damberg, politistøðin í Klaksvík, Kári Thorsteinsson, Karl H. Johansen og Rani Wardum, politistøðin í Havn.

Fremra rað f.v.: Halldis Poulsen, Fútaskrivstovan, Kristina Christiansen, Jens Jensen, politistøðin í Havn.

*Mynd: Politistøðin*

Havnar leksikon:

## Sersjanthúsini - Føroya fyrsta fotoatelier



Hendan myndin er tikin miðskeiðis í 1930-unum yviri við Strond í Havn. Húsini uttast til vinstru eru tey sum Julius Clementsen (í Syðradali), átti (har sum bygningurin hjá Smyril Line er í dag), í miðuni er fyrrverandi grótvirkið, og uttast til høgru eru tey sokallaðu Sersjanthúsini (við pílin).

Tað var í 1849, at sergent Frederik Hansen Jager kom til Føroyar sum ovasti á Skansanum.

Sama ár fóru menn undir at byggja honum hús, og stóðu tey liðug í 1850.

Húsini vóru bygd yviri við Strond, ella sum økið tá kallaðist, »Blegestykket«.

Jager var virkin fotografur, og í 1850 innrættaði hann sær fotoatelier í norðara endanum í húsunum. Hetta var fyrsta fotoateleir í landinum.

Jager búði í húsunum til 1861, tá hann flutti aftur til Danmarkar.

Í 1865, tá »politikorpset« bleiv sett á stovn, og fram til 1875, búði »kvartermester« í Sersjanthúsunum.

Í 1875, tá meslingaepidemiin breyt út, og fram til umleið 1919, bleiv húsið brúkt sum epidemihús, og eftir tað vórðu tey leigað út til íbúðir.

Í dag stenda Sersjanthúsini (ella rættari, ein lítil partur á teimum) úti á Reyni.

Á myndini sæst at fyrsta vegastrekki yviri við Strond er gjørt. Arbeiðið bleiv boðið út í 1934, og er myndin tí tikin einaferð miðskeiðis í 1930-unum.

Innsettu myndina hevur Jager sjálvur tikið í 1852, og vísir hon hvussu Sersjanthúsið sá út, tá tað var nýbygt.

Tey, sum hava okkurt at viðmerkja í sambandi við myndina, eru vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen, ið savnar tilfar til Havnar leksikon, á telefon 314647/273168.

**Dagurin**

**20. januar. Brøðramessa.** Hildin til minnis um teir báðar *Fabianus* og *Sebastianus*. Teir eru ikki brøður, men vórðu fyri trúar sakir tiknir av døgum sama dag í árinum, Fabanus, sum var pávi, umleið ár 250, og Sebastianus – kristin hermaður – umleið ár 288. Tað sigst, at teir báðir eru jarðaðir undir tí núverandi kirkjuni San Sebastian í Róm.

Fabianus er rómverskt ættarnavn. Sebastianus er upprunaliga grikst navn, ið merkir heiðurverdur.

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**